# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vátt komið í reiðrið

Í Norðurlondum og flestu europeisku londum hevur tey síðstu hundrað árini verið siðvenja fyri tøttum samstarvi millum javnaðarflokkar og fakfelagsrørslur. Tær stóru samfelagsbroytingarnar í postídnaðarsamfelagnum hava tó elvt til stórar broytingar í hesi støðu, og skilnaður er millum flokkar og fakligu landsfelagskapirnar.

Hóast Føroya Javnaðarflokkur beinleiðis er runnin úr verkmannarørsluni, so hevur parlagið millum flokk og rørslu ongantíð verið so tætt sum tað var í okkara grannalondum. Hinvegin vóru fakfelagsformenn oftast virknir limir í Javnaðarflokkinum. Eftir kreppuna og serstakliga við stovnanini av Verkamannafylkingini var beinleiðis komið til einkis millum Javnaðarflokkin og teir partar av fakfelagsrørsluni, sum høvdu stuðlað flokkin. Men fylkingin hvarv, og alt bendir á, at nakrir av leiðarunum, t. d. forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, vendu aftur til tann flokk, sum hóast alt hevur verið flokkur løntakarana. Nú er aftur vátt komið í reiðrið, og hesa ferð er orsøkin útlendingalógin. Forkvinnan í landsins størsta fakfelag boðar frá, at hon fer ikki at stuðla Javnaðarflokkinum, eftir at Løgtingið hevur samtykt útlendingamálið

Tað er leikluturin hjá Javnaðarflokkinum í útlendingamálinum, sum hevur gjørt forkvinnuna í landsins størsta fakfelag so firtna, at hon vendir Javnaðarflokkinum bakið. Hon sigur seg ikki kunna stuðla flokkum sum ganga beint ímóti tí, sum fakfelagsrørslan stendur fyri. Hon er sera hvassorðað og leggur samgonguna undir at diskriminera egnar landsmenn, og tað stutta av tí langa er, at hon heldur ikki, at samgongan hevur lurtað nóg vil eftir fakfeløgunum, og tí kvettur hon nú við Javnaðarflokkin.

Løgmaður heldur forkvinnuna vera órímiliga í sínum dómi. Hann vísir til alt tað góða, sum flokkur hansara hevur gjørt fyri fakfeløg og løntakarar, men verjir seg annars við, at neyðugt er at fáa útlendingar hendan vegin, tí trotið á arbeiðsmegi er stórt. Vit hava áður her umrøtt hetta mál, og tá mæltu vit til at bíða við at samtykkja útlendingalóg, til alt málið er vorðið yvirtikið um eitt ár. Tað tykist framvegis løgið, at hetta mál skuldi skundast ígjøgnum nú fyri at alt møguliga verður broytt aftur um eitt ár. Nú hava vit fingið eina útlendingalóg, sum fakfelgarørslan ikki tekur undir við. Hetta er sera óheppið fyri teir útlendingar, sum koma hendan vegin og fyri alt útlendingamálið, og hetta kann elva til sama illvilja móti framandum, sum vit síggja í eitt nú Danmark. Hetta er mikið spell.

**Sosialurin**

## Lærlingarnir ongan góðan



**JON HESTOY**

Formaður Føroya Prentsmiðjufelag

Landsstýriskvinnan í mentamálum hevur lagt eitt uppskot fyri tingið, ið minkar endurgjaldið, virkini fáa fyri lærlingalønir, meðan lærlingarnir eru á skúla. Eftir uppskotinum skal endurgjaldið minkast úr 75% niður í 50%. Hetta er ein eyka byrða á handverksvinnuna upp á fimm milliónir krónur um árið og fer uttan iva at minka um talið av læruplássum komandi árini. Meira natúrligt hevði tað verið hjá einari samgongu, ið fór til val upp á at betra útbúgvingarmøguleikarnar at sett skipanir í verk, ið stuðla undir møguleikarnar at koma í læru. Politikkurin hjá landsstýriskvinnuni í mentamálum vísir greitt, at yrkisútbúgvingarnar ongan góðan hava í Mentamálaráðnum.

Í lógaruppskotinum er yvirlit við avleiðingum, uppskotið hevur. Har stendur millum annað at: *Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir*. Hetta hóast at tað eru stórir møguleikar fyri, at broytingin fer at hava ávirkan á ein veikan samfelagsbólk: lærlingarnar. Tað skal so sera lítið til, at vinnan setur færri lærlingar og harvið noyðast enn fleiri av okkara ungu av landinum fyri at fáa sær eina útbúgving.

Í 2003 setti táverandi landsstýriskvinnan endurgjaldið niður við 25%, hetta hóast at vinnan og ein minniluti í mentanarnevndini ávaraði um, at hetta kundi fáa ávirkan á lærlingatalið. Á heimasíðuni hjá Yrkisdeplinum sæst, at árini 2003-2005 vóru væl færri lærlingar tiknir inn enn árini frammanundan. Niðurgongdin var so stór, at hesi trý árini vórðu tilsamans gjørdir181færri lærusáttmálar enn árini 2000-2002, ein minking uppá 20%.

Í hesum døgum hoyrist, at 300 ung ikki sleppa inn á miðnámsútbúgvingarnar aftaná summarfrítíðina. Hvat skulu hesi ungu gera? Skulu tey flyta av landinum at taka sær eina útbúgving? Tað hevði verið meira virðiligt fyri landsstýriskvinnuna í mentamálum at lagt uppskot fyri tingið, ið betraði um møguleikarnar at fáa lærupláss. Vónandi finst ein meiriluti á Føroya løgtingi, ið sær at hetta uppskot ikki skal fáa sømdir.

## Ein Smyrlatúrur



**SÓLVIT SIMONSEN**

Fyrsta Hvítusunnudag, fóru vit sum mangir aðrir føroyingar ein túr við Smyrli, vit vóru kona mín, børn og abbabørn. Umborð á Smyrli var sera gott, man fekk alt gott at eta og drekka og blíðskapurin var óførur, av og til hoyrdi tú onkran hittinorðaðan suðring við einum stuttligum bemerkningi. Men tað hendi, at tað vakra, sum tey flestu høvdu vænta sær at sætt, at síggja oyggjarnar í sínum vakra maibúna miseydnaðist. Tað bleiv nemliga mjørki so gott sum allan vegin.

Men nú kemur grenji, hvussu ber tað til, at Smyril ár um ár ger hendan túrin fyriuttan at Sandoyar sýsla kemur til hugs hjá fyrireikarunum. Skulu vit úr Sandoynni vera við, og ongan hava at búgva hjá, fara á hotel náttina fyri, og so aftur á hotel næstu nátt, til morgunin eftir, til rutan kemur at sigla.

Soleiðis verður túrurin so nógv dýrari, men vit eru jú sandoyingar, so hví hugsa um okkum.

Tað, sum eisini fekk meg at taka pennin, var úttalilsi hjá løgmanni í útvarpinum hvar hann kemur og sáar iva um sandoyartunnilin. Hví sáa iva um tað, tað er jú ein løgtingslóg, sum sigur at hann skal byrja í november 2009. So har hevur landsstýrið at syrgja fyri einari fígging til tunnilin, raðfestingin er sett við lóg og tað eiga tit at halda tykkum til, vónandi er løgmaður ikki so veikur, at hann bert hongur uppi í kjólafaldinum hjá konufólkunum úti í Tinganesi, um tað er, so er tað eitt stórt skuffilsi fyri okkum í Javnaðarflokkinum, vit hava havt sterkar leiðarar, sum hava tora at lagt mál fram, sum gagna øllum landinum, og ikki minst tora at staðið við givin lyftir.

Eg skilji ikki at løgmaður, hví hann ikki kann hava eitt svar til løgtingsmennirnar í Sandoynni, her taka vit tað, sum at tað er løgmaður, sum er atvoldin til, at partamaður hansara Gerhard Lognberg stemmar ímóti málum, sum hann annars er við til. Gerhard hevur rygg til at standa aftanfyri givin lyftir, og tað veit løgmaður.

Eg dugi illa at fyrigykla mær, hvat ið hendir, um ikki tunnilin kemur til ásetta tíð, so vit kunnu fáa ágóðan av øllum tí, sum hendir í miðstaðarøkinum, eitt flakavirki er her í bygdini, tað bara fer meir og meir í órøkt, so tað eigur ongan góðan.

Hvar er tjóðveldishøvdingin Høgni Hoydal. Hvar er hansara meining, er hann nú nøgdur við at hava uttanríkis um hendi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.